

*Matvøruhjálpin heldur áfram 1975*



*Her er matvøruhjálpin við at verða býtt út*



*Her er tyrla á veg við hjálp til eina fjarskotna bygd*

Vit komu yvirum eitt eiði, og útsýnið hiðani er avbera vakurt. Røðin av fjøllum síggjast langan veg. Nú gekk leiðin omanbrekku hinumegin eiðið. Har møttu vit Berisja Gunsjulla. Hann var lærari her á missiónsstøðini, er giftur og tey búgva í Derra, sum er ein av bygdunum í Djarso.

Berisja hevði verið sera ágrýtin og hjálpsamur við at leggja arbeiðið til rættis fyri okkum báðar í Djarso. Fyrrapartin gekk hann runt í bygdini og segði frá í hátalara, at vit komu. Nú kom hann ímóti okkum og segði, at hann var bangin fyri, at vit kanska ikki fóru at koma, hóast tað, at vit vóru í góðari tíð.

Tá ið vit nærkaðust plássinum, har vit vóru von at koma saman, fór Berisja inn aftur í bygdina Derra og rópar í hátalaranum, at nú var klokkan trý, og nú máttu tey koma.

Skjótt savnaðist fólkið saman. Tað var ikki av tí mesta av kvinnum í dag. Tær søgdu, at fleiri vóru farnar á marknaðin í Gidole, og nógvar vóru úti á akrunum at lúka illgresi. Ein fjøld av børnum var komin, minst hundrað í tali, og nakrir menn vóru eisini. Vit funnu fram hondarbeiðið til teirra, sum høvdu verið fyrr og góvu teimum nýtt, sum ikki høvdu verið áður. Nú í løtuni seymaðu allar blusur til sín sjálvs ella til børnini.

Gangurin var nógvur. Øll tosaðu í senn. Tú mátti næstan rópa, um tú skuldi siga okkurt við tann, sum var næst við. Summar settust niður á steinar, meðan aðrar stóðu og seymaðu. Tá ið tú fór gjøgnum rúgvuna av fólki at hyggja eftir, sást tú ymiskt stuttligt. Ein staðni stóð lítli sonurin ella dóttirin og togaði í faldin, meðan mamman seymaði. Aðra staðni sat maðurin og seymaði, meðan konan hugdi at. Onnur høvdu arbeiðið við sær. Tey sótu og spunnu bummull á hondsnældu.

Tá ið vit høvdu hildið á í tveir tímar, vórðu hondarbeiðini løgd saman í eina pappdós til næstu ferð.

Øll settust niður, og so varð hildin andakt.

## Ov lítið av regni

Nú eru vit komin til 1974, árið við stóru hungursneyðini. Tað var munur á. Heima í Føroyum var óivað nóg mikið av regni. Her longdist okkum eftir regni nú. Grasrótin var brend av í summum støðum eisini. Hetta bøtti ikki um støðuna.

Konurnar bóru vatn higar at selja, men nú søgdu tær, at keldurnar vóru farnar at torna upp eisini.

Trúboðarin Skúli Svavarson, sum tá var stjóri á missiónsstøðini, var í Arba Minch ein av døgunum. Har var nóg mikið av vatni. Hann tók við sær øll tey íløt, sum rúmaðust í bilin, og kom aftur við teimum fullum av reinum og góðum vatni. Fólkið her í Konso var nú av álvara farið at líða neyð av svongd.

Tær tvær seinastu regntíðirnar vóru alt ov stuttar, so tað gjørdist hallár. Nú var hjálp komin ymsa staðni frá. Serliga var tað Kirkens Nødhjælp og Redd Barna í Noregi, sum sendu pening. Tey sendu eisini arbeiðsfólk út at býta út kornið og mjólkapulvur. Kornið varð fyri ein stóran part keypt fyri hendan pening úr øðrum landslutum í Etiopia, sum ikki vóru so hart raktir av turkinum. Nógv skal til, og dýrt var at frakta vørurnar langar teinar á ringum vegi. Til tær bygdirnar her í Konso, sum koyrast kann til, varð hjálpin fraktað við tveimum Landroverbilum, sum vóru gáva frá Noregi til hetta sama endamálið. Tær allarflestu av bygdunum høvdu ongan veg, og hagar mátti so alt berast av asnum ella fólkinum sjálvum. Ein partur av hjálpini varð býtt út á klinikkini til teirra, sum tørva hjálp.

Tað fór vist at ganga ein mánaði í minsta lagi til regnið fór at koma.

## Fekk nýggja nøs og mann

Á klinikkini gekk alt sína gongd. Tað høvdu verið nógvir sjúklingar í seinastuni, upp ímóti 100 um dagin.

Demmese og Halge fóru til Addis-Abeba til læknaviðgerð. Tað var Demmese, har annar fóturin var kropnaður, sum áður er greitt frá. Ein ortopedur, sum arbeiðir í Addis Abeba, vildi royna at gera okkurt við fótin á honum. Hann skuldi vera burtur eitt hálvt ár í minsta lagi. Men fóturin var so illa farin, at har gjørdist einki. Hann fekk at vita, at her var einki at gera, og hann kom skjótt heim aftur.

Halge vaskaði klæðir á klinikkini. Hon hevði sum smágenta eina sjúku sum gjørdi, at nøsin hvarv, og andlitið gjørdist heilt avskeplað. Læknin í Gidole gjørdi henni eina nýggja nøs. Hetta var nú ikki bara sum at siga tað og mátti gerast í fleiri umførum. Hann sendi nú Halge til Addis Abeba til hendan sama læknan, sum skuldi royna at fríðka hana enn meira. Hon rýmdi tó, áðrenn viðgerðin var av. Tað var ikki bert sum at siga tað at koma úr Konso til Addis Abeba. Har var hon einsamøll, og hon dugdi heldur ikki málið. Hetta gjørdist ov mikið fyri hana, hon fekk eina psykosu. Av henni gjørdist hon frísk aftur. Seinni giftist hon kortini og fekk eitt barn.

## Hungursneyð av álvara

Nú er komið longri út á árið. Hungursneyðin var farin at gera um seg av álvara. Tað var sagt at hundratúsindir doyði í hungir. Vit vóru við í hjálpararbeiðinum. Kornið kom við lastbilum úr Addis Abeba. Her var tað so lagrað upp við missiónsstøðina í Konso.

Tað vóru tveir helikoptarar, ein úr Noregi og ein úr Eysturríki, sum førdu kornið út til bygdirnar, har tað varð slept niður til fólkið. Har vóru so onnur fólk, sum býttu út, og øll fingu sítt. Her hjálptu vit til, so frægt sum vit kundu.